**Framløga av ársfrágreiðing Sjókovans um fiskivinnuna 2025**

Góðan dag, øll somul

Tað er mær ein gleði at bjóða tykkum øllum vælkomnum til hetta tiltak, har ársfrágreiðingin hjá Sjókovanum um fiskivinnuna í 2025 verður løgd fram.

Í samgonguskjalinum hjá nýggja landsstýrinum er ásett, at ein greiður og framskygdur vinnupolitikkur er avgerandi fyri menningina av Føroyum næstu árini. Vit leggja serliga dent á nýskapan, betri gagnnýtslu av rávøru og hægri virðisøking.

Hetta er ein staðfesting av, at vit eiga at arbeiða fyri, at meira virðisøking fer fram í Føroyum, og at fyritøkur hava góðar møguleikar at menna framleiðslu, vørur og útflutning.

Virksemið hjá Sjókovanum samsvarar sera væl við hetta stavnhald. Endamálið hjá Sjókovanum er júst at stimbra eina burðardygga menning og nýskapan í føroysku sjófeingisvinnuni.

Sjókovin hevur eisini ein týðandi leiklut sum vitanardepil. Gjøgnum greiningar, gransking, altjóða verkætlanir og miðlan verður viðkomandi vitan gjørd atkomilig fyri almenningin, vinnu, miðlar, lesandi, myndugleikar og politikarar.

Greiningar av avreiðingarvirði, útflutningi, kostnaði, oljunýtslu og lívfrøðiliga grundarlagnum undir fiskiskapinum eru eitt týdningarmikið grundarlag fyri okkara virkisøki og fyri tey mál, sum eru sett í samgonguskjalinum.

Tað er ein týðandi uppgáva hjá okkum sum myndugleiki at stuðla undir, at henda vitan verður umsett til ítøkilig átøk og menning í vinnuni.

Fyri nøkrum árum síðani var stuðulsskipanin Fiskivinnuroyndir umskipað, so meira dentur nú verður lagdur á størri vinnuligar verkætlanir innan gransking, menning og nýskapan. Hesar verkætlanir skulu skipast sum bindandi samstarv millum føroyskar vinnufyritøkur og føroyskar granskingarstovnar sum til dømis Sjókovin.

Fleiri spennandi verkætlanir eru í gongd - menning av kostískoyti, royndir innan umhvørvis-DNA og samskipan av innvigingartølum til at tryggja betri vitan um okkara fiskastovnar, fyri

at nevna nøkur dømir. Hetta vísir, at stórir møguleikar eru fyri framhaldandi menning og virðisøking í vinnuni.

Innan altjóða samstarv og gransking hevur Sjókovin eisini veruliga gjørt seg galdandi. Tað er hugaligt at síggja umfatandi virksemið hjá Sjókovanum og ikki minst innan granskingarsamstarvið hjá ES.

Millumtjóða samstarvið og vitanardeiling innan fiskivinnuna er eisini ein greið raðfesting hjá okkum sum myndugleika.

Í ár hava Føroyar formansskapin í norðurlendska fiskivinnusamstarvinum. Í tí sambandi skipa vit í summar fyri ráðstevnuni "Fiskur og framtíðin".

Ráðstevnan verður í Silo á altjóða degnum fyri havið 8. juni. Millum evnini er nýskapanartøkni og matvørur úr sjónum í 2026, og hvussu vit eggja ungum at starvast innan framtíðar fiskivinnuna. Vónandi fara vit at síggja fleiri tykkara á ráðstevnuni.

Kæru áhoyrarar og gestir.

Sjókovin hevur ein týdningarmiklan leiklut í at miðla og gera vitan meira atkomiliga fyri vinnuna, myndugleikar og Føroya fólk.

Hetta tiltakið í dag er júst dømi um hetta.

Sum umboð fyri Føroya landsstýri skal eg takka umboðum fyri Sjókovan fyri tað arbeiði, ið tit gera. Tilfar tykkara og virksemi annars, eru týðandi grundarlag fyri stimbran, menning og nýskapan av fiskivinnu okkara.

Við hesum orðum ynski eg øllum vælkomin til hesa framløguna hjá Sjókovanum av ársfrágreiðingini um fiskivinnuna fyri 2025.

Takk fyri.